gult10 cyan10 magenta10 svart10



# Við ringum tannabiti

**– Arbeiðsgevararnir hava avdúkað seg sjálvar sum orðloysingar og tað var við ringum tannabiti, at vit skrivaðu undir nýggjan sáttmála , sigur Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag**

SEMJA

*Áki Bertholdsen*

– Tað var við ringum tannabiti, at vit skrivaðu undir, tí arbeiðsgevararnir hava avdúkað seg sjálvar sum orðloysingar.

Hóast tað eydnaðist at gera ein sáttmála, sum er søguligur, er Ingeborg Vinther, formaður í Føroya Arbeiðarafelag, alt annað enn nøgd við semjuna, sum varð gjørd við arbeiðsgevararnar á Hotel Hafnia tíðliga mánamorgunin.

Tað var um hálvgum fimm tíðina mánamorgunin at Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag øðrumegin, og Føroya Arbeiðsgevarafelag hinumegin, skrivaðu undir eitt uppskot, sum semingsmenninir høvdu lagt fram .

Sostatt var verkfallið av, eftir at tað hevði vart í næstan tríggjar vikur.

Partarnir høvdu tá sitið á Hotel Hafnia síðani klokkan 11 leygarkvøldið og teir høvdu sostatt samráðst í næstan 30 tímar út í eitt, tá ið semjan fekst í lag.

Og sum skilst var talan um hart stríð og sera truplar samráðingar, har einki var greitt, fyrr enn í evstu løtu.

## Nógv vónbrot

Ingeborg Vinther sigur at hon er alt annað enn nøgd við sáttmálan.

– Tað er nógv, sum vit eru vónbrotin av, sigur hon.

Hon sigur, at størsta vónbrotið er, at arbeiðsgevararnir lupu frá teimum semjum, sum vórðu fingnar í lag, áðrenn samráðingarnar slitnaðu.

Talan er eitt nú um semjuna, sum varð gjørd um tøkni, um ókeypis arbeiðsklæðir, um lærlingar og um setanarbrøv, sum ikki eru við í semingsuppskotinum, sum varð góðtikið.

– Sostatt lupu arbeiðsgevararnir frá sínum orði og tað er lítið sømiligt fyri teir. Men so vita vit tað og tað skal vera teimum seint gloymt, tí hetta fara vit sjálvsagt at minnast til eina aðru ferð, sigur formaðurin í Føroya arbeiðarafelag .

Hon fýlist eisini á leiklutin hjá semingsmonnunum í hesum sambandi.

– Tað er átaluvert, at teir tóku tað, sum semja var um, burturúr semingsuppskotinum. teirra uppgáva er at finna semju um tað, sum ósemja er um. Teirra uppgáva er ikki at broyta tað, sum semja er um, sigur hon.

Fleiri onnur krøv, sum tey høvdu lagt fyri Arbeiðsgevarafelagið, vórðu heldur ikki gingin á møti.



*Ingeborg Vinther er ikki nøgd við leiklutin hjá semingsmonnumum. Samráðingarnar um vikuskiftið vóru harðar og truplar og onki varð avgjørt, fyrrenn í síðstu løtu. Myndina tók Jens Kr. Vang av samráðingarfundinum mánanáttina*

Annars gevur hon arbeiðsgevarunum skyldina av verkfallinum.

– Teir vildu ikki samráðast um tey krøv, vit høvdu lagt fram. Vit høvdu lagt krøvini fram við støði í tí sáttmála, vit høvdu. Men tað er átaluvert, at tað skuldi ganga so leingi, áðrenn arbeiðsgevararnir yvirhøvur vildu samráðast um okkara krøv.

– Tað var ikki, fyrrenn leygarkvøldið, at arbeiðsgevararnir vildu viðurkenna okkum hendan demokratiska rættin, sigur hon.

## Fólk við royndum fáa meiri í løn

Tað, sum gjørdi, at tey kortini skrivaðu undir, var fyrst og fremst, at nú hava tey fingið aldursviðbøtur við í sáttmálan.

Tað hevur verið eitt hjartamál hjá fakfeløgunum at tey skulu fáa løn eftir starvsaldri, tí tey halda, at tað er órímiligt, at ein, sum lítlar, ella ongar royndir hevur í einum arbeiði, skal fáa líka góða løn, sum ein, ið hevur drúgvari royndir.

– Hetta var tí eitt heilt avgerandi mál fyri okkum at fáa við í sáttmálan, sigur Ingeborg Vinther. Nú, vit fingu ásetingarnar um starvsaldur við í sáttmálan, hava vit skrivað fakfelagssøgu, tí hetta hevur ikki verið við í nøkrum sáttmála hjá tímløntum yvirhøvur, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at nú hol er sett á málið um starvsaldur, er hetta nakað, sum kann verða útbygt í sáttmálanum so hvørt í komandi samráðingum.

Annars var eitt krav frá arbeiðsgevarunum, at alivinnan skuldi verða undantikin í framtíðini.

– Tvs, at ætlanin var at taka verkfalsrættin frá einum parti av verkafólkinum, og tað kundi undir ongum umstøðum góðtakst. Men tað varð nógv tíð brúkt upp á at tað kravið afturvíst, sigur Ingeborg Vinther.


# Stóra bringu



## ella lítla?

**Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-stødd?**

**Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína stødd.**

**Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.**

**Vit hava eisini korsilett í stórum støddum**

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

Sosialurin - 311820


VIÐMERKINGAR

# Tímabýtið í fólkaskúlanum

**Bjørg á Rógvi**

Bleiv ikki sørt skelkað aftan á at hava lisið samrøðu við mentamálaráðharran, Torbjørn Jacobsen, í Sosialinum 26. mai við yvirskriftini "Tímatalið í skúlunum er valstríð" .

Torbjørn sigur í nevndu grein m.a., at tað ikki stendur verri til við tímatalinum komandi ár, enn árini frammanundan. Hetta kann lættliga skiljast, sum at skúlarnir hava havt og hava lógarásettu tímarnar at ráða yvir, men soleiðis er støðan als ikki.

Fari eftir førimuni at lýsa trupulleikan við tímatalvuni í Vestmanna Skúla. Undirritaða er foreldur at næmingi, sum gongur í 3. flokki og fari tí at taka hendan sum dømi. Í flokkinum ganga 27 næmingar, 18 dreingir og 9 gentur. Floksstovan hevur eina gólvvídd uppá 33 fermetrar, í hesum høli húsast sostatt 27 skúlaborð, 27 stólar, 27 skúlataskur og ikki at gloyma 27 næmingar saman við einum lærara og í onkrum tímum tveimum.

Her er ikki bert talan um plásstrot, tí í tímatalvuni hjá somu næmingum vanta nevniliga eisini tímar. Helvtin av næmingunum hava tveir frítímar um vikuna í handverk og list helvtina av skúlaárinum og fáa sostatt ikki teir tímar, tey hava rætt til sambært tímabýtinum.

Av tí at flokkurin er so stórur og flokshølið lítið, er tíðin nú væl og virðiliga búgvin til, at flokkurin verður deildur í helvt, soleiðis at í komandi 4. flokkunum verða ávikavist 14 og 13 næmingar. Hetta at flokkurin verður deildur ger støðuna enn truplari, um tímabýtið ikki verður broytt, tí nú koma enn fleiri tímar at vanta í, tí tímarnir verða sum nú er, ásettir eftir næmingatalinum í viðkomandi skúla. (soleiðis er støðan eisini í komandi 5. flokki, ið telur 26 næmingar).

Tað kann kanska tykjast løgið, at aðrir skúlar við sama næmingatali sum Vestmanna Skúli fáa tímatalvuna at hanga saman. Hettar er avgjørt ikki tí, at hesir skúlar hava betri leiðslu enn Vestmanna Skúli, men tí, at tilgongdin av næmingum í hesum skúlum er meira javnt stór.

Undirritað heitir so inniliga á Torbjørn Jacobsen um at taka støðuna í ramasta álvara og lata verða við at sláa málið upp í glens og gera tað um til partapolitiskt valstríð.

gult11 cyan11 magenta11 svart11



# Tryggja nú part av flotanum

TRYGGING

*Jan Müller*

- Vit eru nøgdir í løtuni, men málið er at fáa eini 30% av marknaðinum sigur stjórin í Trygd, Christian Nielsen, sum frá nýggju skrivstovu síni nú kann eygleiða kappingarneytan alt samdøgrið runt. Hann dylur ikki fyri, at hann er sera fegin um nýggja arbeiðsplássið og her ikki minst um tað ótrúliga umhvørvið á Kongabrúnni, tá at tað ikki er avgerandi fyri úrslitið. –Herfra kann jeg holde et våget øje med vores konkurrent på den anden side, og det kan de også med os, så det skulle være den ideelle ballance til gavn for kunderne. Nakað soleiðis málber hann seg, nú tey 10 starvsfólkini hjá Trygd eru flutt inn í nýggja arbeiðsplássið í Gongini.

Christian Nielsen, sum tók við sum stjóri á Trygd í 1. november 1997 heldur gongdin hevur verið tann rætta síðani. Í fjør høvdu teir tryggingarpremiur uppá 17.6 mill. kr. Í løtuni er hon góðar 31 mill. kr. Henda framgongdin stavar serliga frá teimum unmleið 50 skipunum, harav 9 av teimum heilt stóru, sum teir hava fingið sum kundar. 1. januar stovnaður teir sína egnu sjótrygging við Páll Konoy sum stjóri. Frammanundan arbeiddi hann hjá Tryggingafelagnum Føroyar. Christian Nielsen sigur, at teirra premiur liggja á sama støði sum tær norðurlendsku. Teir hava so eisini eitt tætt samstarv við Codan. Hann vísir aftur gitingum um, at kundar hjá Føroya Banka verða trýstir til at brúka Trygd. –Tað stendur kundum okkara púra frítt at brúka tann peningastovn teir vilja. Hann vísir við hesum eisini aftur, at teir eru farnir at undirbjóða fyri at fáa eitt nú skipini frá kappingarneytanum.

Christian Nielsen er dani men hevur ongar ætlanir um at fara aftur til Danmarkar í bræði. Konan er júst flutt til Føroya. Nú hevur hannn so sett seg til rættis í nýggju hølunum við tí fyri eygað at veita føroyskum tryggingartakarum eina góða tænastu og vøru.



*Nevndarformaðurin Jørn Astrup Hansen og stjórin í Trygd, Christian Nielsen í nýggju hølunum í Gongini*

*Mynd Jan Müller*

# Trygd flutt oman á Kongabrúnna

**Tey bæði føroysku tryggingarfeløgini standa nú andlit til andlit á hvør sínum armi á Kongabrúnni í Havn. Fríggjadagin flutti Trygd alment inn í søguligu og stásiligu hølini í Gongini nr. 7**

TRYGGING

*Jan Müller*

- Hetta er ein merkisdagur fyri TRYGD. Felagið er vorðið nóg stórt til at kunna flyta heimanífrá. Hetta segði nevndarformaðurin í Trygd, Jørn Astrup Hansen, bankastjóri, tá tryggingarfelagið beyð til almenna móttøku í nýggju hølunum fríggjadagin. Hann frøddist bankans vegna um, at Trygd nú kundi flyta inn í júst tey somu hølini, har Sjóvinnubankin hevði sítt nógva virksemi miðskeiðis í 80-unum. – Tað hevur altíð verið sera tætt samband millum Trygd og ban kan. Tað vóru tær somu kreftirnar, sum í 1932 stóðu aftanfyri stovnani av Trygd og Sjóvinnubankanum og bankin var eisini frá byrjan av størsti partaeigarin í P/f TRYGD segði Astrup, sum tí eisini metti tað heilt náttúrligt, tá bankin var við til at fáa lív í aftur Trygd, tá føroyska tryggingarmonopoliið var avtikið í 1997. Hann vísti á, at tað longu frá byrjan varð greitt, at tørvur fór at verða á munandi kapitali, um Trygd skuldi mennast til at gerast eitt trúverdugt alternativ til gamla tryggingarmonopolið. Og her var tað so at Føroya Banki kom inn sum ein av stóru partaeigarunum.

Nevndarformaðurin helt fyri, at Trygd er vorðin ein "eldri dama" sum hann málbar seg, nú felagið hevur meira enn 70 ár á baki. – Men Trygd – sum ein onnur Tornerosa – hevur sovið vakurleikasvøvn ta mesta av tíðini. Frá 43 til 97. Sum ein avleiðing av tryggingarmonopolinum misti felagið í 1943 møguleikan at tekna nýggja tryggingar. Men 1. februar 1998, bert eitt ár eftir, at monopolið varð avtikið, var felagið aftur klárt til at taka ímóti nýggjum kundum.

Jørn Astrup Hansen helt, at tryggingartakarar hava tikið væl ímóti felagnum, nú Trygd eftir bert fýra árum hevur fingið fatur í 20% av marknaðinum. Hann helt eisini fyri, at tað hevur verið til stórt gagn fyri føroysku tryggingartakararnar, at teir nú hava fingið møguleika at velja millum fleiri tryggingarfeløg. Við hesum sipaði hann til, at tænastan, sum í dag verður veitt kundunum, er munandi betri enn fyri bert nøkrum árum síðani.

Nevndarformaðurin í Trygd metti eisini, at tryggingarpremiurnar eru munandi lægri nú men legði aftrat, at tær í einstøkum førum eru lækkaðar ov nógv. Hann vísti annars á ta hepnu gongd, sum hevur verið í Føroyum, har tað er gingið burtur frá monopolstøðum í vinnuni og sipaði her eisini til sølu av fiski. –Við ella uttan politiskum vælvilja, so hevur føroyski marknaðurin, tí hann er so lítil, ein tendens til at menna monopol. Tá ein fyritøka er vorðin so stór, at hon kann heysta fyrimunir av stórdrift, kemur hon oftani í eina monopollíknandi støðu. Tað er sjálvandi ein fyrimunur fyri brúkararnar, at vørur og tænatur kunnu framleiðast við stórdrifsfyrimunum. Men oftani vísir tað seg, at hesir fyrimunir hava eginleika at fjarða burtur, tá monopolstøðan tekur yvir.

Jørn Astrup Hansen segði seg vóna, at viðurskiftini á tryggingarmarknaðinum koma í eina náttúrliga legu, soleiðis at frí og jøvn kapping kann menna seg og sipaði við hesum m.a. til ta sannroynd, at tað hevur eydnast tryggingarmonopolinum gjøgnum 55 ár at gerast heilt einaráðandin og harvið at hava kunnað savnað saman ein veldugan kapital – við einum diffusum og anonymum eigaraskara – sum í dag kann brúkast til at halda kappingarneytum burt frá marknaðinum.

- Eg vóni, at tryggingartakarar framhaldandi fara at brúka Trygd, tí harvið tryggjar man sær, at tað eisini í framtíðini verður kapping á tryggingarmarknaðinum. Tryggingartakararnir hava uppiborið eitt alternativ – og TRYGD vil lata hetta alternativ.



*Starvsfólkið gleðir seg til at arbeiða í nýggju hølunum við útsýni fyri Kongabrúnna*

*Mynd Jan Müller*


## Scaleo Microtower C76-31

Celeron 766 MHz Geril • 128 MB SDRAM • 20 GB harddisk • Integrerað 2D/3D Direct AGP Graphics • 12xDVD drev við forritum, disklastøð, 16 bit integrerað ljóðkort, standard hátalari • 56K internt DATA/FAX riser modem • Microsoft Windows MILLENIUM DK • Microsoft Works Suite 2000*: Word 2000, Works 2000, Encarta World Atlas 2000, Picture it! 2000, Autoroute Express 2000 • Microsoft spæl • Standard knappaborð • Wheel mús • 1 ára garanti • 17" skermur

**Kr. 10.995,-**



FÍGGING, DØMI:
Útgjald: 3.665
Rest yvir 12 mðr.:
688 um. mðn.
Rest yvir 18 mðr.:
477 um. mðn.

FUJITSU COMPUTERS SIEMENS

3arin ELECTRONIC

SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo